

*Við sigar í munni, pakka í hond og stavi í hinari – soleiðis kenna vit eisini Emil, her hann er avmyndaður inni í køkinum*

## Frá skómakara til útgevara

Í november 1978 gav Bókagarður út 10 ára minnisrit sítt. Í hesi útgávuni skrivar Sverri Egholm m.a. um Emil Thomsen, tá hann gjørdist heiðursdoktari:

"Øll munnu vit vera errin og takksom. Kenna okkum eiga lut í hesum heiðuri, sum er ein útlendsk hámeting av landsmanni okkara og harvið av landi og fólki okkara.

Vit eru eisini eitt sindur foy. Hava vit givið hesum slóðbrótandi arbeiði Emils nóg stóran ans? Hava vit ikki sýnt honum meiri øvund enn takksemi?

Væl veit eg, at føroyingurin fær seg so illa at vísa alment slíkar kenslur sum takksemi og virðing. Kortini er tað lítið sum skal til fyri at eggja og stimbra. Bert eitt blídligt orð er almikið vert - og tað hava vit øll ráð at lata.

Tað, sum Emil Thomsen hevur avrikað eftir 10 árum er meira enn eitt manndómsbragd. Tað er eitt ótrúligt undur, ið hvat tú so annars heldur um mannin og verkið.

Emil kom av fátækum fólki. Lærdi skómakarayrki, men vísti seg seinni at hava stak gott hegni sum sølumaður.

Frá at selja dustsúgvarar fekk hann tað innskot - sum mangir hildu vera ørt - at fara undir endurprenting av okkara gomlu útseldu bókmentum.

Við fanatiskum áræði og stálsettum vilja, sum fáum er unt at hava, tveitti hann seg út í hetta váðaverk, uttan fyrst at søkja um ella vissa sær fíggjarliga trygd frá nøkrum.

Tá so fyrsta royndin eydnaðist og hinar við, og hann framvegis ikki bað um almennan ella annan fíggjarstuðul, fóru summir at óttast fyri, at maðurin helst fekk peningaligan vinning burtur úr váðaverkinum. Slíkt hevði verið óhoyrt og tí helst eisini ómoralskt!

Eg kenni meg sannførdan um, at tað als ikki er fyri peningaligan vinning at Emil er farin undir bókaútgávuvirki sítt. Tað sæst m.a. av tí kræsna úrvalinum og tí stóru og stútt vaksandi bókagoymsluni við bundnum útgávupeningi. Bøkurnar eru allar yvirhøvur væl útgjørdar og prísirnir ikki órímiligir. Sjálvandi, gevur sølan hall, so steðgar bókaútgávan av sær sjálvum, og tað hevði verið stórt spell".

hann hevði við íslendskt sjónvarp fyri nøkrum árum síðani.

Eg loyvi mær at spyrja hann enn ein spurning, áðrenn sjónvarpið verður tendrað: Hvussu tað ber til, at hann framvegis er við so gott mót, hug og framvegis hevur ætlanir um bókaútgávur.

- Tað ber so væl til, sigur hann, sum um tað var nakað at spyrja seg um. - Frágreiðingin er hon, at eg havi eitt hjarta úr Sumba!

Hetta krevur sum vera man eina frágreiðing, og hana gevur hann eisini:

- Sært tú, tað er nakað serstakt við Sumbiar-hjartanum. Tað er sum um eg ongatíð havi merkt at eg havi nakað hjarta.

- Eitt slíkt hjarta úr Sumba, tað er har bara. Tað er øgiliga sterkt, slær tá tað skal og er eisini sera áhaldið og treyst, skal eg siga tær. Soleiðis er tað bara!

At hetta Sumbiar-hjarta enn slær likamliga, tað er so eitt. Men hetta sama hjartað slær so sanniliga eisini eitt stórt slag fyri tær føroysku bókmentirnar.

### Akademiskur heiður

Stovan í heiminum hjá Emil er eisini sermerkt á mangar mátar. Hon er, eins og køkurin, úr træi og prýdd við málningum úr ymiskum støðum her í bygdini.

Á tí eina vegginum hanga fleiri myndir, sum munnu hava havt enn størri týdning fyri Emil enn málningarnir: Hetta eru heiðursprógv hann hevur fingið úr øllum Norðurlondum.

Millum hesi man tað, hann fekk 2. juni 1978 helst vera tað, ið størsta fagnaðin eigur: Tann dagin, tá Emil gjørdist heiðursdoktari við lærda háskúlan í Lund. Eitt heiðurligt minni um eitt framúr avrik.

Sverri Egholm hevur lýst hetta, so væl í einum ummæli av hesi stórhendingini. Sverri skrivar soleiðis:

"Rætt sum í ævintýrinum: tann fátæki skómakaralærlingurin við ongum bókligum lærdómi verður "doctor honoris causa" - fær størsta akademiska heiður, sum gevst við eitt lærdómssetur og sum bert unnast teimum heilt fáu!"

Hetta fór fram bert 10 ár eftir at Emil var farin undir útgávuvirksemið sítt. Longu tá vóru um hundraðtals bøkur givnar út, og síðani tá er eitt stórt tal av bókum somuleiðis givnar út gjøgnum Bókagarð.

Fólki flest munnu hava dámað væl hesar útgávurnar, men Emil hevur eisini havt sínar atfinnarar. Í samrøðuni við íslendska sjónvarpið segði hann tí eisini, at ein profetur er ofta illa lýddur - ella vanvirdur - í sínum egna heimlandi.

- Eg skilji ikki rættiliga hví so er, segði Emil við íslendska sjónvarpið. - Eg havi brúkt nógvan pening uppá hesar bókaútgávurnar, og eg havi so ikki forvunnið stórar upphæddir.

- Tað er altíð torført at bróta upp úr nýggjum, segði hann í tí samrøðuni.

### Kvæðabøkurnar

Tá ein so hyggur seg runt um í stovuni, so varnast ein skjótt at her er ein ávísur samanhangur. Tað er, sum um hesi heiðursprógvini stara ímóti einum av stóru – kanska størstu - úrslitum Emils.

Fyri nøkrum arum síðani setti Emil sær nevniliga fyri at fremja enn eina ætlan: At geva tey føroysku kvæðini út í bók.



*"Tað, sum Emil Thomsen hevur avrikað er meira enn eitt manndómsbragd. Tað er eitt ótrúligt undur, ið hvat tú so annars heldur um mannin og verkið"*

Óneyðugt er at siga, at hetta er eitt megnararbeiði: Eru kvæðini mong í tali, so eru ørindini tað enn meiri - kanska millum 70 og 80.000 tilsamans.

Fyri honum var greitt, at skuldu øll hesi út í eini bókarøð so fór helst at verða talan um einar 40 kvæðabøkur tilsamans. Hesar skuldu allar gevast út yvir fleiri ár.

Hetta visti Emil, og hann visti samstundis, at tað ráddi um hjá honum at bera skjótt at skuldi hann sjálvur fullføra hesa ætlan sína.

Á rað á træborðinum standa nú 35 kvæðabøkur so erpnar. Hesar eru allar komnar út tey seinastu árini, men enn vanta nakrar í til røðin er fullkomin.

- Eg skal siga tær sum er, at eg havi biðið til Gud um at eg mátti liva so leingi, til øll hesi kvæðini kundu koma út. Og nú sær tað út til at tað eydnaðist mær, sigur hann.

So seint sum hósdagin í hesi vikuni skuldi Bjørn fara til Havnar eftir teimum báðum seinastu bindunum í hesi ótrúligu bókarøðini. Nú er hetta verkið so fullkomið.

### Bók um Steffan

Men Emil er ikki liðugur enn við ætlanum. Tvær ætlanir aftrat liggja fyri framman: Komandi ár kemur út eitt innihaldsyvirlit yvir allar hesar 37 kvæðabøkurnar.

- Í hjartanum á mær liggur eisini eitt stórt ynski um at geva út eina bók um listamálaran Steffan Danielsen (1922-1976) higani úr bygdini. Tað arbeiðið er í roynd og veru longu farið í gongd.

- Ta bókina eri eg øgiliga spentur uppá, tí, skal eg siga tær, - næst eftir Mykines, so er Steffan besti málarin, sum vit føroyingar nakrantíð hava átt, sigur Emil.

Henda bókin verður so enn ein bók í røðini av bókum við varandi virði. Bøkur sum prýða mong føroysk heim í dag, og bøkur sum hava stóran týdning fyri mentunararv okkara.

Men hinvegin, - tosa ikki um aldur við Emil. Tosa ikki um nakað lívsverk hjá Emil. Tað hava onnur gjørt, og tað kunnu onnur meta um.

Her situr í øllum førum ein aldrandi maður, sum ikki hevur lagt nakrar árar inn, og hevur fleiri ætlanir fyri framman. Kanska fleiri ætlanir enn mangir av javnaldrum hansara.

Góða eydnu og góðan føðingardag!